DAGSINS MEINING

Gongur rætta vegin

Bretskir myndugleikar kunngjørdu nú um dagarnar úrslitið av 22. útbjóðing til leiting eftir kolvetni á landgrunninum. Og ikki kann sigast annað enn, at tað er eitt gott signal til okkara egnu kolvetnismyndugleikar og vinnuna, nú flestu av nýggju loyvunum eru latin á Atlantsmótinum og her ikki minst allan vegin framvið okkara marki. Tað sigur í hvussu er so mikið sum, at altjóða oljufeløg hava ikki mist áhugan fyri økinum, sum er beint við okkasra egna mark og framhald av teimum teigum, sum longu eru bodnir út hjá okkum.

Í forlongilsi av hesi útbjóðingini kemur so okkara nýggja útbjóðing. Tað vil tí vera rættiliga náttúrligt at rokna við, at feløgini, sum hava fingið tillutað loyvi bretsku megin markið, eisini fara at hava áhuga í at fáa loyvi føroyskumegin markið, tí tá kunnu tey koma at arbeiða við samanhangandi økjum, tó hvør sínu megin markið.

Vitandi at politisk mørk ikki eru jarðfrøðilig mørk, og vitandi, at tað er ikki óvanligt, at olju- og gassfelt kunnu ganga tvørtur um mørk millum lond, er tað eisini ein logisk niðurstøða, at oljufeløgini, sum síggja Atlantsmótið sum eitt nýtt og spennandi oljuøki, fegin vilja hava fatur á goymslum í undirgrundini, líka mikið um tær liggja á føroyska og bretska landgrunninum. Einasti munur eru so sjálvandi treytirnar, sum bæði londini seta feløgunum. Við verandi oljuprísum átti tað tó ikki at verið nøkur forðing. Munurin er kanska "bara" basaltið okkara megin. Men postiva avbjóðingin er so aftur, minnast vit aftur á tað, sum umboð fyri Oljufyrisitingini greiddi frá á oljumessuni í Norra herfyri, at møguleikar eru fyri at gera risastóra fund undir sama basalti.

At ljóskastarin aftur av álvara er settur á Atlantsmótið við hesi bretsku útbjóðingini er ikki til at taka feil av. Tá so stór oljufeløg sum Shell og BP, Statoil og ChevronTexaco, ENI og BG og Amerada Hess fyri bert at nevna nøkur framvegis kappast um at fáa leitiloyvi nærhendis okkara marki, so merkir tað, at vónirnar til at finna olju og gass framvegis eru til steðar.

Vit kunnu so bara vóna, at bretska útbjóðingin ikki drenar alla orku, her eisini peningaligu orkuna hjá feløgunum, soleiðis at tey velja okara egnu 2. rundu frá. Men tá hugsað verður um, at partur av strategiini hjá oljufeløgunum hinvegin er at spjaða váðan, so er eisini hugsandi, at tey gera tað í hesum førinum eisini, tvs. at tey vilja spæla uppá fleiri hestar, soleiðis at skilja, at fáa tey ikki fatur í tí rætta á breskum øki, so gera tey tað kanska føroysku megin markið.

Tað er kærkomið, at eitt so stórt felag sum ChevronTexaco, nú av álvara setir fokus á alt økið framvið markinum úr suðuri og heilt norður. At Statoil eisini er við er í tráð við úttalilsini hjá stjóranum í felagnum herfyri. Men umframt hesi feløgini eru so øll hini aftrat, og tað er bara at vóna, at tey ikki steðga við tí 22. UK-runduni men eisini koma við í 2. rundu her hjá okkum. Annars tillukku til føroysku feløgini, at tey nú eisini eru komin við av álvara í oljuleiting aðrataðni.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Líka fyri lógini ???

Marjun Olsen
Tvøroyri

Hesin spurningur er ógvuliga aktuellur á Tvøroyri í hesum døgum. Fólk flest hava hoyrt í útvarpinum um eina undaliga starvsetan av leiðara í Fríðtíðarskúlanum í Trongisvági.

Lýst var í bløðunum eftur pedagogi. Tveir umsøkjarir vóru. Ein pedagogur sum arbeiðir í Fríðtíðarskúlanum á 4 ári og hevur allar førleikar at røkja starvið, fult líka væl sum nakar annar.

Hin umsøkjarin, lærari, slektaður av Tvøroyri, búsitandi í Havn og hevði hug at royna at búgva her suðuri eina tíð, fær starvið.

Pedgogfelagið og Landsstýrismaðurin á økinum gera kommununa varðuga við at skeift er fari fram í hesi starvsetan. Aftaná knappar 4 vikur sigur kommunan seg at hava loyst máli.

Loysnin er henda !!!

Landstýrismaður á økinum Hans Pauli Strøm biður um fund við alt býráði, men bert javnaðarmennirnir Sverri Midjord, Heri Mortensen og býráðsformaðurin Kristin Mikkelsen møta (restin av býráðnum fær ongantíð boðini) À fundinum verður samtykt at ógilda setanina av læraranum, men landsstýrismaðurin skal broyta Dagstovnalógina soleiðis, at tað í framtíðini skal kunna setast lærari sum leiðari á Fríðtíðarskúlum. Seinri hevur fullmannað sosialanevnd og fullmannað býráð fund, sum samtykkir at ógilda starvssetanina av læraranum. Samtykt verður eisini at søkjast skal av nýggjum eftur leiðara. Nú skuldi man trúð at søgan endar, nei nú blívur hon rættuliga spennandi.

Meirilutin í sosialunevnd Sverri Midjord, Heri Mortensen løgdu uppskot fram um at seta ein fyribilsleiðara til landsstýrismaðurin hevur broytt lógina og **gitið nú tvøra- og føroyafólk** hvør hesin fyribilsleiðari er. Púra rætt, sami lærari sum beint bleiv loystur úr starvi.

Her á Tvøroyri er alt við tað gamla, bert tú ert av rætta slagnum, ert tú væl syrgdur fyri.

Rættartrygd: **Hvat er tað ???**

Hvør misnýtir 4.statsmaktina í Føroyum?

Marjus Dam
løgtingsmaður

Hvør er tað, ið manipulerar 4. statsmaktini við vindandi skeivum upplýsingum?.

Situr Høgni Hoydal enn einaferð aftanfyri sínar dyr og smílist, tí aftur eydnaðist at lumpa 4.statsmaktina at taka upp skeiv tíðindir til høvuðstíðindir, fyri at skaða sitandi samgongu? Tað er tað mangt, ið bendir á.

Seinastu tíðina hevur mangt og hvat verið at hoyrt í 4. statsmaktini: Útvarpi, Sjónvarpi, og bløðum okkara.

Men onkuntíð kann ein ikki annað enn undrast á nøkur viðurskiftir

Undanfarni Landsstýrismaður í fíggjarmálum setti ein bólk at kanna alla MVG lógina. Sagt var, at mongu undantøkini vóru við til at úthola MVG lógina. Embætismannabólkurin hann setti, hevur nú arbeitt í nøkur ár. Og hann heldur sjálvandi fram at arbeiða sjálvt um núverandi samgonga hevur tikið við. Bólkurin er nú liðugur og tilfarið verður sent til hoyringar hjá ymiskum feløgum. Men mest sannlíkt er, at Tjóðveldisflokkurin hevur fingið fatur í tilfarinum, og klippir bitar úr arbeiðinum og sendir tað til pressuna - fyri at villeiða.

Og í pressuni verður endurgivið - púra skeivt - at Landstýrið arbeiðir við at ... nærum forkoma øllum virksemi her á landi.

Nú eri eg valdur í Løgtingið og eri í samgongu. Og eg kann upplýsa, at ongin ætlan um at forkoma hesum landi fyriliggur. Tann uppgávan verður bert loyst við at gjøgnumføra stevnuskrá Tjóðveldisfloksins. Og henni ganga vit als ikki eftir. So á hesum øki, kunnu fólk verða púra trygg.

Men áliggur tað ikki 4. statsmaktini at verða kritiskur og kanna, hvør keldan er?. Tí tað kann ikki vera endamálið hjá 4. statsmaktini at bera rangan tíðindaflutning. Gera teir tað, so renna teir politisk ørindir og missa harvið fullkomuliga sítt trúvirði.

Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.